# Ítróttarblaðið

## Ítróttartoymið á Sosialinum:


Hilmar Jan Hansen
einslistir@email.fo


Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo


Tróndur Arge
trondur@sosialurin.fo


Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo


Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo

## Oddmar er ársins skjútti

Oddmar Nielsen, Ørvur, er ársins skjútti hjá teimum vaksnu í ár. Tað skrivar heimasíðan www.faroe-archery.com. Ársins skjútti verður kosin út frá heildini við uppmøting, venjing, betring av skjóting, úrslit til kappingar og annað. Fleiri vóru um boðið hjá teimum vaksnu. Eggaba Andreasen, Annika Vang, Jastrid M. Jensen og Oddmar Nielsen.


Savnsmynd

# Hans á Lag givin


Savnsmynd

**FÓTBÓLTUR** Hans á Lag verður ikki partur av hópinum hjá HB í hesum kappingarárinum. 36 ára gamli verjuleikarin er givin

Uni Holm Johannesen

– Hann hevur takkað fyri seg, og vónandi kunnu yngru spælararnir taka við, segði Julian Hansen í útvarpinum í gjár.

Sambært Faroesoccer.com, hevur Hans á Lag spælt í fremstu røð síðan 1994. Í 2005 royndist hann væl sum framherji, tá hann skeyt 11 mál í 27 dystum. Annars hevur hann verið drúgvur verjuspælari.

uni@sosialurin.fo

# Bjarni Djurholm farin úr nevndini

**FÓTBÓLTUR** Bjarni Djurholm ynskti ikki at halda fram í nevndini hjá B36

Uni Holm Johannesen

Bjarni Djurholm varð valdur inn í nevndina í fjør, men ynskti ikki at halda fram. Á aðalfundinum um vikuskiftið varð Jógvan Næs valdur í hansara stað. Nevndin er nú mannað við Sámali Ímundarsyni sum formanni, Hákuni Steingrímssyni sum næstformanni, Hans Debes er kassameistari, Jákup Mørk er skrivari og Jógvan Næs er nevndarlimur. Tiltaksmenn eru Símun Midjord og Magnus Hansen, skrivar heimasíðan hjá B36.



– Roknskapurin vísti, at tað gongur framá hjá felagnum eftir fellisárini, skrivar b36.fo.

uni@sosialurin.fo


Savnsmynd

# Pál setti trý met

**SVIMJING** Pál Joensen setti tvey nýggj met um vikuskifti, tá Bank Nordik stevna var í Vági

Uni Holm Johannesen

Leygardagin var hann skjótasti føroyingurin í 50 metra bringusvimjing nakrantíð. Pál kom á mál við tíðini 29.42 sekund. Hann átti eisini gamla metið frá Oyggjaleikunum í 2009. Tá svam hann teinin á 29.72 sekund.

Hann setti eisini nýtt føroyskt met í 100 metra bringusvimjing. Tíðin var 1.03.90. Hann átti eisini gamla metið á 1.03.99 frá november í 2010.

Í gjár setti hann eisini nýtt met í 200 metra firvald. Tíðin var 2.04.74. Gamla metið hjá honum frá Oyggjaleikunum í 2009 var 2.05.81.

Birita Debes setti met í 50 metra firvald við tíðini 28.97 sekund. Kvinnurnar hjá SuSvim, Guðrun Mortensen, Helena Strøm Sævarsdóttir, Tanja Skaalum og Shaila millum Garðarnar, settu met í 4x50 frísvimjing. Tíðin var 1.50.24.

uni@sosialurin.fo

## Miðlarnir skriva...

Eftir steðgin koyrdi Neistin víðari í sama tempo, løgdu hart trýst á Tjaldri og vardu ógvuliga væl. Fríða Petersen stóð heilt væl í neistmálinum. Alt riggaði hjá neistakvinnunum í dag, og tjaldurskvinnurnar sóu meiri og meiri uppgevandi út sum tíðin gekk.

www.neistin.fo

Hetta bleiv eisini endaliga støðan. Móti endanum løgdu HB leikararnir nógv fyri og tað gekk útyvir sinnalagið, tá Vagnur Mohr Mortensen fekk eitt sólaklárt reytt kort móti endanum av dystinum.

www.nordlysid.fo

Tjaldur hevur nú ryggin móti múrinum, tí um vit ætla okkum í FM finaluna, so mugu vit finna stórspælið og góða hugburin fram aftur. Dysturin komandi sunnudag móti Stjørnuni er ein vind eller forsvind dystur. Vinna vit, so er enn møguleiki fyri at koma í finaluna, meðan um vit tapa, so eru vit úti av FM stríðnum í ár.

www.tjaldur.net

Men túrurin sum so hevur verið fínur. Menn hava víðgirt seg á Viðareiði og notið sera væl av blíðskapi norðan fyri Fjall, ella skuldu vit heldur sagt »fjøll«. Vit fáa møguleikan at hevna okkum aftur longu komandi sunnudag 27. mars, tá Stórsteypadysturin er á skránni.

www.hb.fo